


# Gartnari søkist

Vit sóknast eftir einum starvsfólki til urtagarðsdeild okkara í 2x3 at byrja beinan vegin.

Starvið umfatar innkeyp og kundaavgreiðslu, umframt røkt av deildini sum heild. Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú tekur við ábyrgdini av deildini og saman við leiðsluni leggur til rættis vøruúrval, arbeiðisgongdir og marknaðarføring.

Vit væntað at tú ert útbúgvin gartnari ella hevur hollan kunnleika til urtagarðsfakið, og at tú hevur sans fyri at seta vørur upp í handli.

Løn og arbeiðistíðir verða at avtala við rætta umsøkjaran.

Umsóknir skulu sendast innan 15. juni 2006 til:

**P/F Timburhandilin**
Heykavegur 4
Box 3038
110 tórshavn
Att: Maj Johannesen

2x3 TIMBUR H.T. HANDILIN

# Hús, hús, hús...

SETHÚSAMARKNAÐURIN

HESTPRENT - TEL. 314 555

## Starvslýsingar




á portal.fo

**Kostnaður:** (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

**Kostnaður:** (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo

# Størv hjá Vestmanna Kommunu

**Námsfrøðingar til Gjáarlon**

Søkt verður eftir fimm námsfrøðingum til Gjáarlon at byrja 14. august 2006. Talan er um fulltíðar størv, tó við møguleika fyri at arbeiða niðursetta tíð. Størvini verða sett eftir avtalu.

Dagstovnurin er í fimm eindum við vøggustovu og barnagarði – skipaður til íalt 84 børn.
Stovnurin letur upp kl. 7:15 og letur aftur kl.17:15. Gjáarlon er ein grønur stovnur, sum leggur dent á at fara væl um umhvørvið inni sum úti. Umstøðurnar eru sera góðar bæði innan- og uttandura.

**Vit bjóða**
Í tí dagliga arbeiðinum leggja vit stóran dent á trivnaðin hjá starvsfólkum og børnum, og vit virka alsamt fyri at skapa álit og tryggleika fyri børn og foreldur. Gerandisdagurin er somuleiðis merktur av, at vit eru ein grønur stovnur.

**Vit ynskja**
Vit leggja dent á, at tú hevur førleika at arbeiða sjálvstøðugt, ert ágrýtin og nýhugsandi. Tú tekur ábyrgd og virkar í góðum samstarvi við samstarvsfelagar og foreldur, og saman við okkum ert tú við til at menna tað námsfrøðliga arbeiðið. Tú sært møguleikar og avbjóðingar fram um forðingar.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanarviðurskifti eru skipað sambært sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Morið A. O. Gardy, leiðara, á telefon 470134 / 230134 ella Marin í Niðristovu Durhuus, varaleiðara, á telefon 470138 / 239138.

**Umsókn og freist**
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Um eingin námsfrøðingur søkir, verða hjálparfólk fyribils sett í størvini. Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 23. juni klokkan 12. Setanarsamrøður verða í viku 26.

Send eina umsókn við avriti av prógvum og viðmælum til:

Gjáarlon
Hornavegur 16
FO-350 Vestmanna

Umsóknir skulu merkjast “Námsfrøðingar, Gjáarlon”.

Vestmanna Kommuna
www.vestmanna.fo